gult cyan magenta svart

Fiskivinnan og granskararnir:

Ov lítla nyttu av hvørjum ø›rum

Granskararnir halda ikki vinnuna gagnn‡ta arbei›i teirra nóg væl. Vinnan heldur seg fáa alt ov líti› burturúr granskingini. Hóast felags mál – at fáa meira burturúr fiskinum – er samskifti› ofta vánaligt.

Bjørt Samuelsen

Óluva: – Ta› er næstan ógjørligt at gera lantí›arætlanir, tí sum fiskivinnugranskari í Føroyum ver›ur tú bert sett fyri eina verkætlan í senn

– Sjálvandi vil vinnan lata meira pening til fiskií›na›argransking, men fyrst mugu vit kenna á okkum, at vit fáa naka› fyri pengarnar, sigur Gu›ri› Andorsdóttir, gó›skust‡ringlei›ari á Føroya Fiskavirking alias United Seafood.

Eftir at altjó›a rá›stevna í fiskií›na›argransking júst hevur veri› í Føroyum, hevur fokus veri› sett á tørvin á matvøru- og fiskií›na›argransking her heima. Sosialurin var vi›, tá tríggir »ekta›ir« fiskií›na›argranskarar hittu umbo›i› frá føroyska fiskií›na›inum.

Óluva Niclasen, Magnus Pauli Magnussen og Helgi Nolsøe eru øll kn‡tt at fiskivinnudeildini á Heilsufrø›iligu starvsstovuni.

Ov lítla ávirkan

– Stikkor›i› er at gera vinnuna meira kappingaføra. Men hvussu í allari ví›u ver› skalt tú gera ta›, um vinnan onga ávirkan hevur á ta›, sum granska› ver›ur í. Eini tíggju til fimtan verkætlanir eru í gongd í løtuni. Vit hava bert veri› vi› at velja tvær av teimum, sigur Gu›ri›.

– Vi› teimum prosjektunum,eg havi arbeitt vi›, hevur eingin trupulleiki veri› at fáa vinnuna vi›. Innan fiskiroyndir hevur vinnan sloppi› at sagt sítt, á›renn verkætlananir eru settar í gongd, men ofta eru eingi uppskot komin ha›ani, sigur Helgi.

– Nei, ta› er ikki rætt. Vinnan er sloppin at velja *frá*, ongantí› at velja *til*! Ein listi vi› 20 uppskotum er lagdur fyri okkum, og vit ver›a so spurd: Hvat av hesum halda tit, vit skulu velja. Ta› er bestemt ikki ta› sama sum at sleppa at vera vi› at avgera, sigur Gu›ri›.

– Ta› hevur helst veri› so ómakaleyst hjá Fiskirannsóknarstovuni og Heilsufrø›iligu Starvsstovuni at sita á teimum 8 milliónunum, sum árliga ver›a játta›ar, at eingin annar skal sleppa framat, heldur hon.

Hettar heldur Óluva vera løgi›:

– Eg kann svara fyri okkum granskarar, at vit heldur enn fegin vilja arbei›a saman vi› vinnuni. Tímir vinnan at vera vi› at seta saman og greina verkætlanir, er ta› jú ta› ideella. Men ta› krevur eitt arbei›i frá bá›um sí›um, sigur Óluva.

– Flestøll í vinnuni eru á einum máli um, at man hevur fingi› alt, alt ov líti› burturúr granskingini, sum hevur veri›. Hví eru granskingarumstø›urnar hjá okkara høvu›svinnu so heilt út av lagi vánaligar, hóast nógvar milliónir árliga ver›a n‡ttar til fiskií›nar›argransking? Ta› mátti bori› til at fingi› nógv meira burturúr pengunum, heldur Gu›ri›.

– Men kann ikki vinnan keypa sær granskingina sjálv, vil hon hava størri ávirkan?

– Í dag fer vinnan ofta uttanlands at keypa sær gransking. Nógv av hesum kundi óiva› veri› gjørt her heima, svarar Gu›ri›.

Hóttarnir og missálit

Gu›ri› heldur eina for›ing fyri betri samstarvi vi› granskararnar vera, at granskingin er kn‡tt beinlei›is at einum stovni, sum eisini umsitur eftirliti›.

– Sum vinnupartnari ivast tú í, um tú skalt tora at fara inn í eitt prosjekt. Einu løtuna er Starvsstovan partur í eini vinnulívsverkætlan, og næstu løtuna koma tey kanska út og steingja virki›. Í dag luttekur vinnan í fleiri verkætlanum Starvsstovan skj‡tur upp, simpelthen tí at tey tora ikki anna›. Tey rokna vi›, at siga tey nei, so fellur hamarin.

– Sigur tú, at virkini óttast revsitiltøk, um ikki tey luttaka?

– Ja! Her endurgevi eg pástandir, sum eru komnir úti í vinnuni, sigur Gu›ri›.

– Hatta trúgvi eg einki uppá, flennur Helgi.

– Sjálvandi mugu vera vatntøtt skott millum granskingina og eftirliti›, og ta› haldi eg, ta› hevur veri›, sigur hann.

– Tankin hevur streyfa› meg, at hatta kann vera ein trupulleiki, vi›gongur Óluva.

– Hatta er heilt n‡tt fyri mær, sigur Magnus Pauli sum hevur starvast vi› matvørugransking í fimtan ár. Hann heldur, at hesum mugu partarnir fáa grei›u á skjótast til ber.

– Hygg Norra til dømis, har man hevur skilt gransking og eftirlit at. Ta› er helst gjørt fyri at sleppa undan, at ta› lekur millum deildirnar. Politii› og bileftirliti› eru heldur ikki sami stovnur, sigur Gu›ri›.

Karmar og skipan vanta

Bæ›i granskararnir og umbo›i› fyri vinnuna halda, at granskingin má skipast nógv betur enn í dag.

– Uppgávan hjá tí almenna er at fastleggja nakrar karmar sum granskingin skal virka innanfyri, og at seta nøkur mál, so man veit, hvat ta› er man vil, sigur Helgi. Gu›ri› er púra samd:

– Vit mugu spyrja: Hví vilja vit hava fiskií›na›argransking í Føroyum? Politikararnir vilja hava gransking, men ána ikki hví. Ein má seta sær eitt langtí›ar mál, heldur hon.

Hóast tey f‡ra ikki eru á einum máli um, hvar og undir hvørjum stovni ein samskipa› gransking átti at ligi›, halda tey øll, at ney›ugt er vi› einari granskingarmi›stø›:

– So hev›i vinnan eisini vita›, hvar hon skuldi vent sær, sigur Magnus Pauli.

Tey eru eisini samd um, at fíggingin eigur at ver›a b‡tt ímillum ta› almenna og vinnuna.

framhald á næstu sí›u

Óluva: *– Ta› skilji eg ikki heilt. Vit vilja heldur enn fegin samstarva t‡tt vi› vinnuni*

Helgi: *– Vinnan ver›ur bo›in at ver›a vi› í rá›legging av verkætlanum, men kemur sjáldan vi› uppskotum*

Magnus Pauli: *– Tosa vinnan og vit ikki saman, ste›gar alt upp*

gult cyan magenta svart

Oy›ing og skapan á sama sta›

»Ta› visti eg ikki tá, at fyrst eg sá Sandager›i kom at ver›a ein stjørnuløta í lívi mínum, har ein oy›andi torpedo var komin á land, var sprongd og hev›i forvolt ska›a, sat nú nøkur ár seinni ein ma›ur, meginskald okkara, Janus og yrkti. Oy›ing og skapan, á einum og sama sta›, seg›i Ey›un Johannesen m.a. í rø›u hildin í Sandager›i vi› sólstø›ur 21. juni 2000

Fyrsta meg minnist Sandageri›, var práti› ímillum tey vaksnu heima í Rabarbukvarterinum um eina t‡ska «loft-torpedo«, i› traff kábulhúsini hjá Stóra Nordiska. Tey lógu beint her ni›anfyri gøtuna. Hetta hendi i 1941. Hi›ani gekk telegrafsambandi› ígjøgnum ka›al til Hetlands og ví›ari til Skotlands og út í stóra heimin har 2. ver›aldarbardagi leika›i á. Eg ímynda›i mær, at kom tú út til sjónarringin har langt sunnanfyri Bor›una og Glyvursnes, kundi tú sigla har úti á sjónarringseggini og hoyra duni› frá krígnum – og kanska eisini, um s‡ni› var gott, hyggja oman yvir bardagan. Sandager›i var tey fyrstu árini heima í Brekkugøtu einans eitt gandaor› – eitt mantra – sum eg ongantí› hev›i sæ› vi› mínum egnum eygum. Mamma tosa›i um gubba sín, próst Dahl. Um vakra hava hansara, ósan og fossin, har hon hev›i vitja og spælt sum barn, me›an pápi hennara Kristin í Geil, hev›i okkurt ørindi úti hjá vinmanninum, próstinum.



Úti hjá vinmanninum, próstinum

Fyrstu fer› eg minnist meg at hava sæ› Sandager›i, var úr erva, uppi á s‡nuni frá Hospitalsvegnum, hond í hond, leiddur av pápa mínum. Eg man tá hava veri› eini 6-7 ára gamal Ta› var ein sunnudag fyrrapart. D‡rdarve›ur – um hesa árstí›. Vi› opnum sansum stó› eg uppi á eggini og leit oman yvir bøin. Sá próstahavan, fossin og ósan. Útfyri svumu dunnur og æ›ur. Eg sá ikki próstahúsini. Tey lógu loyniliga fjald aftanfyri tey tøttu trø›ini. Ta› visti eg frá mammu.

Sunnudagur stilli, trygd og fri›sala

Hev›i eg ikki varnast, ta› eg sá, so var hendan løtan allarhelst bert farin framvi›, veri› burtur og gloymd. Ta› var einki løgi› í tí, passa›i mest bara inní myndina, ja, sum prikkurin yvir i´i›. Eg sá ni›ri í bønum ein hvíthærdan mann í centrum í einum stórum, gulum sóljuteigi. Hann rørdi seg ikki. Eg spurdi babba, »hvør er hasin ma›urin?«. »Hatta er Janus Djurhuus«. »Hví situr hann har?« «Hann yrkir!«.

Ta› visti eg ikki tá: At fyrst eg sá Sandager›i, kom at ver›a ein stjørnuløta í lívi mínum, har ein oy›andi torpedo var komin á land, var sprongd og hev›i forvolt ska›a, sat nú nøkur ár seinni ein ma›ur og yrkti. Meginskald okkara, janus og yrkti. Oy›ing og skapan, á einum og sama sta›: Sandager›i.

Eg minnist eisini Janus heima í b‡num, áraka› Hans Joensen og Ebenezer. Sum hamskiftur. Vi› kenning og grummur í huga. Tá ræddist eg hann, henda sama fri›arliga, hvíthærda skallan í sóljulteiginum, á bønum úti í Sandager›i. D‡rd og ótti í einum og sama dreingjasinni. Hví var ver›in so vor›in?

Her úti í Sandager›i. Vesturmarki› í barnaver› míni. Her hevur tú fanga kombikk og glasállar. Fiska síl og veri› í grind, 14-15 ára gamal sveima› hond í hond vi› henni, sum var títt fyrsta forelskilsi, og seinni einsamallur tá hon narra›i teg. Høvdu tær, sum aftaná hana komu vita, at hetta gjørdist mín fasta kærleiksruta, gøtan her framvi› próstagar›in og Sandá og ni›an til stóra mylnuhjóli› hinumegin Argjabrúnna; og so skímingskossarnir undir spinnarínum, sum stendur hevja á stabbum yvir um ánna. Sjálvandi var ta› tann útvalda tann einasta eina, me›an ótrú›skapurin ímóti øllum hinum mól mær í knokkinum. Hvussu kundi man ta›? Elska so nógvar, tá tær hvør sær, var hon i› skuldi ver›a fyri alt lívi›? – Stóra mylnuhjóli› mól, tá slúsan í mylnuhylinum var› opna›, og longsta áin í Føroyum, Sandá fekk hjóli› at ríkja og mala, sprandi vætuna útyvir helluna og fríggjarapari›, me›an spunatólini spunnu í erva inni hjá spinnaranum í Horni.

Solei›is melur lívshjól okkara frá tí slúsan ver›ur opna› og lei› okkara gjøgnum lívi› før›ir okkum eftir ánni, sum drívur stóra hjóli›, me›an Nornurnar spinna okkara dagar og ár.

Barnaárini í Havn høvdu ítøkilig mørk

Jar›arparadísi› sigst at hava ligi› ímillum áirnar báar, Eufrat og Tigris. Sandá og Hoydalsá fevndu mítt barndóms Paradís: Havnina!

Hetta var mín heimsta›ur, her var mítt heim og her var eg heima. Seinni lærdi eg at kenna mítt heimland, á›renn eg fór út í heimin, at nema mær lærdóm, síggja meg um og at royna meg sjálvan. Á fer› millum lond, úti á ví›um havi uppdag›i eg alheimin: Himnahválvi› stjørnurnar, og sjónarringin allan. Og eg var mitt í tí øllum – í centrum, eins og Janus í sóljuteiginum. Ta› sum lá innanfyri, uttan- og aftanfyri alt hetta velduga mátti vera heimspekin. Ta› fann eg aftur í skaldskapi og í listini, sum gjørdist mítt lív og yrki mítt. Men yvir øllum: Trúgvin, Vónin og Kærleikin.

Kanska ta› var Janus skald í sóljuteiginum, sum gav tær angan av, at vera heima í heiminum, her mitt í alheiminum vi› hesa sandstrond, har æ›urnar svumu útfyri, og svimja enn, me›an fossurin rann og rennur enn og gamla mylnuhjóli› mól og lívshjóli› melur enn. Á hesum heilaga sta› kveiktist ein neisti tann sunnudagi fyrrapart fyri mongum árum sí›ani.

Mundi Janus yrkja ta› løtuna, – og í so fall – hvat? Kanska sat hann bara í takklæti og frøddist um, at hann undanfarnu náttina hev›i umsett til føroyskt: «Über allen gipfeln ist ruh« eftir Goethe?

Yvir hvørjum tindi er ró›.
Av hvørjum vindi valla ljó›
villist um vøll.
Blikurin blundar á sundi.
Burtur í blundi
berast vit øll.

– Alla a›rasta›ni hevur man skipanir, har partvíst vinnan og partvíst ta› almenna fíggja granskingina. Vit ynskja eina almenna grundfígging, sum man kan arbei›a út frá, og so mugu granskararnir út at fáa fatur á prosjektum í vinnuni. Tá i› vinnan kemur inn vi› fígging, kann hon eisini krevja naka›, heldur Óluva. Í løtuni arbei›ir hon vi› eini eina verkætlan, har tíggju vinnupartnarir eru vi›.

Gu›ri›: *– Í vinnuni hoyrir tú um virkir sum ikki tora at siga nei til verkætlanir Starvsstovan skj‡tur upp. Ta› er óheppi at sami stovnur situr á gransking og eftirlitinum*

– Roykivirkini hava havt trupulleikar vi› Listeriabakteriuni, og verkætlanin er tí beinlei›is rætta› ímóti vinnuni. Tá var lætt at fáa undirtøku, grei›ur Óluva frá.

– Merkir ta›, at granskararnir eru ov passivir at fáa vinnuna vi› í granskingarverkætlanir?

– Avgjørt. At samskifta er ein vísund í sjálvum sær. Ta› er skilligt, at vit hava trupulleikar vi› at bera fram okkara kunnleika. Ta› er ein stór avbjó›ing, at fáa samskifti› millum vinnuna og granskararnar uppá eitt nógv, nógv hægri stø›i enn í dag.

Ovmiki› at gera

Tey f‡ra eru púra samd um, at ta› eru ovmiki› av áhugaverdum evnum granskast kann í her heima.

– Gransking ljó›ar so ræ›uliga flott . Men í mínari ver› skal granskingin her í nógv størri mun vera vørumenning. Samstundis skulu vit hava fólk vi› evnum og kunnan til at taka ting uttanífrá, sigur Magnus Pauli.

– Men grundgranskingini kunnu vit heldur ikki sleppa, heldur Gu›ri›.

– Gransking er ein altjó›a uppgáva. Skalt tú fáa fatur á tí, hini hava, mást tú sjálvur lata naka›, sigur Óluva, sum sjálv er vi› í einari nor›urlendskari verkætlan:

– Tey høvdu ikki tíma› at havt meg vi›, um eg ikki kundi lata eitt einasta úrslit og ongan granskingarførleika hev›i. Tí mugu vit fylgja reglunum, sum eru galdandi innan altjó›a vísund og millum anna› útbúgva okkum sum granskarar á PhD-stø›i osfr.

Tey f‡ra nevna fleiri enn tíggju áhugaverd øki sum granskast kann í í Føroyum. Tey fevna um alt frá heilsufrø›iligari matvørutrygd, um hjáframlei›slu av fiskarestum til aling av n‡ggjum fiskasløgum og mangt, mangt anna›. Og ta› er helst eingin orsøk at óttast, at granskararnir gerast arbei›sleysir í nærmastu framtí›. Sitandi landsst‡ri hevur sagt seg vilja satsa uppá hetta øki, sum granskingarmálará›harrin Høgni Hoydal í útvarpinum nevndi »okkara mest afturútsiglda øki«.

Fimm milliónir eyka eru settar av á ársins fíggjarlóg til praktiskar fiskivinnuroyndir. Hetta kemur afturat átta milliónum, sum árliga ver›a settar av til fiskivinnuroyndir. Hesir pengar ver›a b‡ttir í millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrø›iligu Starvsstovuna og Menningarstovuna.